
*Her sæst at enn er nógv olja eftir rundan um tangarnar hjá SEV*

okkum, sigur Klæmint Weihe, sum ikki metir, at tangin var tærdur.

Klæmint Weihe, sigur at SEV boðaði løgregluni, Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og brunaumsjónini frá, og sigur, at alt fór rætt fram, eftir at óhappið hendi.

Hann greiðir frá, at fuglurin, sum verður oljudálkaður, ikki verður reinsaður, men kiptur á staðnum.

Sambært Klæminti Weihe er talan higartil um einar 20 fuglar.

## Undir kontroll

Suni Petersen, verkfrøðingur á umhvørvisdeildini á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, sigur, at tey hava mælt til eina sonevnda mekaniska upprudding, tvs. at grótið verður trykkspulað. Hann metir, at tungoljan helst endar sum tjúkkir klumpar í sjónum kann fara til botns og flóta við vatnskorpuna.

- Talan er um eitt rættiliga avmarkað øki, sigur Suni Petersen, sum er samdur við teimum, ið siga, at tilbúgvingin er ov vánalig, men at arbeitt verður við at bøta um hetta. M.a. er tilbúgvingin júst yvirtikin á føroyskar hendur.

Suni Petersen greiðir frá, at kommunan er myndugleiki á økinum sambært ha vumhvørvisverndarlógini. Tá talan er um tilbúgving, kann sigast, at arbeitt í trimum stigum. Fyri tað fyrsta eigur fyritøkan, sum dálkar at rudda eftir sær, síðani kommunan, og eftir tað eigur landið at taka um endan, um hini bæði ikki megna støðuna. Harafturat krevst loyvi, um kemikaliir skulu brúkast til oljureinsing.

Suni Petersen sigur, at støðan í Vági er undir kontroll, sum hann tekur til. Hann metir heldur ikki, at 20-30 fuglar er eitt høgt tal, og metir, at teir helst høvdu verið deyðir kortini, um teir vórðu reinsaðir.

Sambært Suna Petersen komu tvinnir lekar á tangan í Vági, sum júst var umvældur.

– Vit fara at krevja munandi betri eftirlit við tangum, serstakliga fyri teir bjálvaðu tangarnar, tí teir eru heitir, sigur Suni Petersen og nevnir stóru tangarnar á verkinum á Sundi, og at vit bara kunnu hugsa okkum, hvat hevði hemt, um hesir fóru at leka.

– Allir partar hava lært nakað av hesum, og SEV tekur støðuna í størsta álvara, metir Suni Petersen.






*Her liggja tvær av mongum oljudálkaðum æðum, sum eru deyðar í einum oljudíki, sum eru funnar hinumegin fjørðin við bedingina. Fuglavinir í Vági hava sæð fylgir av oljudálkaðum æðum leita sær niðan frá at leggja seg at doyggja*